# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale



## ROMANTIKKUR Í BIOGRAFINUM

Treingir tú til eina romantiska uppliving, so er at fara til filmin, sum just er byrjaður at ganga í Havnar Bio. "Dear John" er eitt romantiskt drama um ein ungan soldat, John, sum forelskar seg í eini ungari gentu, Savannah. Komandi sjey árini eru merkt av, at John er burturi á vandamiklum uppgávum við herinum, og tey hittast bert fáar ferðir. Men tey halda sambandið við kærleiksbrøvum, sum at enda fáa lagnutungar avleiðingar. Ein filmur, har tú mást minnast til at hava lummaturriklæði við.

**»DEAR JOHN«**
í Havnar Bio frá hóskvøldinum 24. juni
www.bio.fo



## HELLISKONSERT VIÐ NORÐLÝSINUM

Í summar siglir Norðlýsið út í Heysoynna hvønn týsdag. Har verður farið í smáar bátar, sum síðani føra teg inn í Klæminstgjógv til eina minniliga og óvanliga konsert. Konsertirnar eru við ymsum føroyskum tónleikarum.

**KONSERT Í KLÆMINTSGJÓGV**
hvønn týsdag í summar
www.nordlysid.com




## SKRIG UNDER VAND – NÝGGJ KRIMI

"Skrig under vand" er heitið á eini nýggjari krimi, sum júst er útkomin. Talan er um vinnaran av krimikappingini, sum Politiken og Politikens Forlag skrivaðu út í fjør. 130 handrit komu inn, og høvundarnir handan vinnandi handritið eru spildurnýggir í fakinum. Skrig under vand er nevniliga teirra fyrsta roynd at skriva bøkur. Talan er um hjúnini Jeanette Øbro Gerlow og Ole Tornbjerg, sum siga, at avgerðin um at skriva eina bók var tikin ein dagin, meðan tey vaskaðu upp. Bókin er spádd at gerast ein bestseljari, og parið er longu farið undir tvey'aran.

**»SKRIG UNDER VAND«**
– vinnari av krimikapping
Í bókhandlunum fyrsta dagin.



## FØROYSKT KVØLD Á SEGLLOFTINUM

Mikukvøldið 30. juni verður føroyskt kvøld á segloftinum á Tvøroyri. Á skránni verður føroyskum matur, føroyskur dansur og Anna Kirstin Thomsen fer eisini at greiða frá um Seglofti og søguligu bygningarnar hjá Thomsen har á havnalagnum. Tiltakið kostar 550 kr og tað byrjar kl 19.

**FØROYSKT KVØLD Á SEGLLOFTINUM**
30. juni
Tilmelding á
akt@olivant.fo ella á 221824



## JÓANSØKA Í VÁGI

So er aftur ein stevna á skránni við øllum tí, sum har til hoyrir. Jóansøkan í Vági bjóðar skrúðgongu, kapproður, framsýningar, ponyríðing, hornblástur, fótbóltsdyst, møti, kórsang, uppboðssølu, felagssang, fýrverk, dans, ja, alt sum hoyrir seg til eina rætta, føroyska summarstevnu. Tað, sum plagar at eyðmerkja jóansøkuna, eru nógvu nýklaktu pisurnar, sum seta ein serligan dám á suðuroynna.

**JÓANSØKA Í VÁGI**
leygardagin 26. juni.
www.visitsuduroy.fo